# úsa okkara demokrati

vinna tey muslimsku heilagu økini undir rætt muslimsk ræði aftur, og tað merkir eisini at fáa amerikanskar herstøðir úr arabisku londunum, har Palestina/Ísrael orrustan eisini hevur eitt stórt virði. Mobilisering hevur eisini verið til stríð fyri muslimskum ræði í Kaukasus og kanska serliga Tjetjenia. Eisini var ein ávís mobilisering til kríggið á Balkan í fyrrverðandi Jugoslavia.

## Bin Laden hevur skapt ótryggleika

Laden hevur ikki eitt stórveldi, sum kan bjóða vesturheiminum av, men hann hevur megnað, við einføldum, men væl tilrættarløgdum ætlanum at skaka og ræða vesturheimin. Nevniliga at skapa ótryggleika, hevur altíð verið eitt av endamálunum við yvirgangi, og tað hevur eydnast honum. Yvirgangurin skal millum annað fáa ræðsluna at oyðileggja vesturlendsku samfeløgini. Vit hava sæð hesi gott 4 árini bardagin ímóti altjóða yvirgangi hevur verið, at fleiri sonevnd vesturlendsk virðir eru sett undir trýst. Vesturheimurin breggjar sær av at vera frælsi heimurin, men allíkavæl ber til at hava fólk sitandi sum fangar í fleiri ár uttan rættindi í eini hernaðarlegu í øðrum landi. So er tað sjálv handfaringin av fangunum, har ræðuleikarnir í Abu Graib ikki kunnu gloymast. Flestu lond hava økt um møguleikarnar at hava eftirlit fyri at byrgja fyri yvirgangi, og m.a. er nýggjasta tiltakið í Danmark ein lættari atgongd til húsaransókn. Í London bar av. Bumbuatsóknirnar skelkaðu øll, men løgregluna somikið, at hon gav boð um at skjóta fyri at drepa, um tað varð mett neyðugt. Hetta elvdi til, at ein púra ósekur brasiliubúgvi fekk 7 skot í høvdið, helst uttan at hava havt møguleika at verja seg. Løgreglan royndi at fjala mistakið, men hendingin í sær sjálvum vísir, hvussu skjót vit kunnu verða at seta reglur í verk, sum í veruleikanum kunnu enda við at niðurbróta okkara samfelagsskipan, tá vit verða sett undir trýst. Í Bretlandi var eisini gølan við vápnaserfrøðinginum David Kelly, sum lak upplýsingar til BBC, helst tí hann metti bretsku stjórnina misbrúka vitanina um Irak. Han kom undir stórt trýst, og at enda tók hann lívið av sær.

## Irak kríggið

Fleiri vestanlond valdu somuleiðis at fara í kríggj ímóti Irak, sum helst eisini var í lagi uppá fleiri mátar, men bara ikki mátan tað bleiv gjørt uppá. Saddam var ein búrkroppur, sum helst skuldi burtur. Nógv vistu, at tað ikki fór at verða lætt, og tí hildi flestu eygleiðarar, at ein ætlan um innrás varð tengd at eini ætlan at byggja landið uppaftur, men so var ikki. Sagt varð eisini, at Saddam hevði hópoyðingarvápn, men hesi blivu ikki funnin. Hví var USA so víst í, at vápnini vóru har…seljarin veit sum oftast hvønn hann hevur selt til, ella…?

## Eingin ætlan

Men at fara inn í eitt land sum Irak, uttan at hava eina greiða ætlan við hvussu landið skuldi endurbyggjast, er óðamannaverk. Irak er ikki eitt søguligt land og býtt sundur í nógvar partar, bæði etnisk, átrúnaðarligt, mentunarligt og málsliga. Tí var givið, at tað ikki fór at verða lætt at fáa heildina at virka, tá Saddam var rikin frá. Eitt annað eru allar muturgølurnar, sum eru komnar og eru ávegis. Tað varð longu mutrað áðrenn í sambandi við olju fyri mat, verkætlanina. Men tað sum seinastu tíðina er komið fram, um hvussu USA hevur brúkt oljupengarnar í Irak, er ikki serliga fyrimyndarligt, tá hugsað verður um, at orsøkin at fara í kríggj eisini var at reka ein ódemokrat av vøllinum, og at fáa at dygdargott irakiskt demokrati við góðari stjórnarførslu. At stríðið ímóti yvirgangi eisini verður blandað uppí innanríkisorrustur, kom fram í Spania, sum jú hevur havt sítt egna stríð við baskiska ETA. Táverandi forsætismálaráðharrin var eisini skjótur at geva ETA skyldina, tá bumbuatsóknirnar vóru í Madrid í fjør. Tað gjørdist tó skjótt greitt, at talan ikki var um ETA, men um al-Qaeda.

Í hesum døgum verður arbeitt av øllum alvi fyri at fáa eina grundlóg fyri Irak, men teir tríggir høvuðspartarnir hava ilt við at semjast, og tá landið samstundis er illa plágað av borgarakríggi og yvirgangsatsóknum, ja so er spurningurin um skilið í dag er betri enn undan innrásini?

## Fregnartænasturnar sovið?

Í USA er tað ein afturvendandi spurningur, um hví yvirgangurin 11. september kundi henda, og tað er komið fram, at fleiri ávaringarljós vóru, men at tey ikki vunnu frama. Somuleiðis tykist tað, sum um at vesturlensku fregnartænasturnar ikki hava verið vitandi um umfatandi muslimska samanhaldi, serliga tá talan er um uppreistur. Helst hava muslimar longu ferðast til fyrrverðandi Juvoslavia, fyri at berjast saman við muslimunum. Eins og tað júst er komið undan kavi, at Laden helst hevur fingið venjing frá CIA, tá hann bardist saman við mujahedinunum ímóti sovjetisku innrásini í Afghanistan. Tað tykist eisini sum um at fregnartænastuupplýsingarnar um Irak hava verið antin ov vánaligar ella misbrúktar við vilja. Ein líknandi støða tí bretsku við Kelly tók seg upp í Danmark, tá Frank Grevil í donsku fregnartænastuni lak upplýsingar til fjølmiðlar, fyri at vísa á skeivleikar.

Tað er tó givið, at altjóða yvirgangur er ein stórur trupuleiki, og ST arbeiðir somuleiðis nógv fyri at loysa henda trupuleika. Í mínum hugaheimi er eingin ivi, at bin Laden er ein búrkroppur, sum skal steðgast. Men vit mugu ansa eftir, at vit ikki selja okkara samfelagsvirðir í hesum stríðnum.

## Mugu verja egin demokratisk virði

Í dag verða vit noydd at berjast ímóti yvirgangi, sum tí Osama bin Laden stendur fyri. Men vit mugu ansa eftir, at vit sjálvi ikki fáa snævurskygd samfeløg í hesum stríði. Stríðið hjá vesturheiminum má verða at vísa á virðini í frælsum skipanum, sum tað bestu samfelagskipanina, eins og vit sjálvandi mugu brúka fregnartænastur og hermegi til at fanga búrkropparnar og forða fyri fleiri atsóknum. Men tá bólkar sjálvir taka stig til slíkar atsóknir, sum tær í London, er givið at arbeiðast skal eisini við muslimsku bólkunum í Evropa. Í hesum spælinum hevur Turkaland alstóran týdning, tí sleppur Turkaland tættari ES, kann tað skiljast sum ein størri opinleiki ímóti muslimum. Vit hava longu trupulleikar av strongum sonevndum yvirgangslógum, men eisini ein illvilji ímóti muslimum og serliga arabum er við at fáa fastatøkur, og tað kann elva til enn fleiri atsóknir í Evropa frá muslimum, sum kanska hava búð í t.d. Bretlandi ella Danmark at kalla alt lívið.

At halda fast um okkara virðir er tað týdninarmesta amboðið í orrustuni ímóti yvirgangi. ST hevur júst átalað Bretlad, orsaka av ætlaninum um útvísing av fanatiskum muslimun, so kjakið er byrjað. Tað er givið at kríggj, eisini hetta ímóti yvirgangi, ger at onnur tiltøk enn í vanliga gerðandisdegnum eru neyðug, men vit mugu ansa eftir ikki at missa okkum burtur í hesum stríði.



*David Kelly lak upplýsingar, tí hann helt at alt ikki ruggaði rætt. Bleiv hann trýstur til sjálvmorð?*



*Forsætisráðharri í kríggi, kann hann ávirka støðuna í Irak?*